# Rodrigo komin til Klaksvíkar

KÍ hevur funnið suðuramerikanskan styrk til álopið hjá sær í ár. Felagið hevur gjørt avtalur við brasilska Rodrigo og argentinska Jonathan Tridente. Fríggjadagin kom Rodrigo til Klaksvíkar. Hann skuldi koma hósdagin, men mátti gista í Keypmannahavn, meðan ódnin leikaði í kring oyggjarnar. Lokalblaðið Norðlýsið var til fyrstu venjingina hjá Rodrigo. Venjingin var í KÍ-høllini, og blaðið heldur, at Rodrigo hevði góðan bóltførleika. Jonathan Tridente kemur til Klaksvíkar seinni í hesum mánaðinum.



*Mynd: Norðlýsið*



*Við sigri á grannunum vann VÍF seg aftur í dystin um bronsukrónurnar*

*savnsmynd*

VÍF-KÍF 29-26 (16-14):

## VÍF aftur á slóðina

**Tað kravdi nógv av nervunum, men við sigrinum á KÍF er VÍF framvegis partur av stríðnum um bronsukrónurnar í FM-kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Ungu vestmenningarnir, sum í vetur hava verið at kalla í læru í fremstu hondbóltsdeildini, hava ikki alla tíðina havt eina eins lætta tilveru. Seinastu tíðina hevur talan ikki verið um serliga góð úrslit, og skuldi liðið framvegis vera partur av bronsustríðnum, so var kravið ein sigur sunnudagin, tá grannarnir og botnliðið úr KÍF vitjaði.

Og hesa ferð gekk tað hjá VÍF. Hóast KÍF sýndi ein vilja, sum var munandi stø rri enn í fleiri av seinastu dystunum, so hildu teir gulu seg støðugt á odda í dystinum.

Eina løtu í fyrra hálvleiki var enntá líkt til, at talan skuldi gerast um ein sigur av teimum heilt tryggu, men KÍF vildi ikki veruliga sleppa takinum.

Sum minuttirnir gingu gjørdist spurningurin, hvørt ungu menninir hjá teimum gulu megnaðu at halda høvdinum kalt, tá avgerandi løturnar komu. Og her gjørdist niðurstøðan eitt greitt ja.

KÍF hevði annars minkað munin niður í eitt mál, men seinastu løtuna var tað VÍF, sum hevði eitt gear eyka.

Við sigrinum hevur VÍF framvegis ein teoretiskan møguleika at vinna Neistan aftur í stríðnum um pláss í FM-finaluni. Tann møguleikin er tó kanska dekan ov teoretiskur, men tað man tó smakka væl hjá teimum flestu í Vestmanna, at liðið framvegis er partur av stríðnum um bronsukrónur.

### FAKTA

**VÍF-KÍF 29-26 (16-14)**
10 min: 6-4
20 min: 14-9
40 min: 18-17
50 min: 22-22
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 9(7), Regin Joensen 7, John M. Andreasen 5, Niels Andreasen 4, Karl Johan Djurhuus 2, Joen P. Høgnesen 1
**KÍF:** Damir Oros 12(4), Niklas Reginsson 6, Dean Jankovic 4, Teitur Joensen 1, Regin Petersen 1, Jóan Pauli Olsen 1, Jákup Trygvason 1
**Brotskøst:** VÍF 7, KÍF 4
**Útvísingar:** VÍF 3, KÍF 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

StÍF-H71 30-22 (12-9):

# Spæligleði á Skála



*Heldur ikki H71 megnaði at steðga væl koyrandi maskinuni hjá StÍF, sum tykist stevna beint móti fyrstu greipuni í føroyskum manshondbólti í 10 ár*

*savnsmynd*

**StÍF heldur framvegis støðinum sum besta hondbóltsliðið í landinum. Hesa ferð fekk H71 av at vita frá einum StÍF-liði, sum í løtum var serstakliga vælupplagt**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er eingin, sum tykist kunna steðga strandingum í løtuni. Ikki síðani 7. november er StÍF farið stigaleyst av vøllinum. Og síðani hetta er tað bert hent ta einu ferðina – tann 25. november móti KÍF – at StÍF ikki er farið av vøllinum við báðum stigunum.

Tí var talan kanska um truplastu uppgávuna av øllum, sum H71 hevði sunnudagin, og fyrstu lítlu løtuna staðfestu strandingarnir eisini, at tær avgjørt ikki vilja seta ferðina niður.

H71 varð snøgt sagt blást av vøllinum fyrstu løtuna, og tó at teir aftur sluppu upp í part, tá StÍF setti ferðina nakað niður, so var tað støðugt heimaliðið, sum var leikligа omaná. Nakað, sum eisini gjørdist sjónligt í seinna hálvleiki.

H71 royndi fleiri ferðir at taka leiðsluna hjá StÍF aftur, men miðskeiðis í seinna hálvleiki skrædnaði av álvara. StÍF fekk aftur ferðina upp á eitt støði, har hoyvíkingarnir ikki megnaðu at fylgja við, og so gjørdist talan enn eina ferð um tryggan sigur til oddaliðið.

**Breiðar dygdir**

Og sigurin undirstrikaði bara enn einaferð, at strandingarnir eru glóðheitir í løtuni. Stóru profilarnir eru kanska skotsterku bakspælararnir, men liðið hevur eisini hópin av øðrum dygdum. Sterka bakspælið gevur eisini rúm hjá øðrum spælarum, og tá hesir taka av møguleikunum, er ikki gott at vera fyri.

Eisini í verjupartinum stendur liðið seg serstakliga væl, og hevur Marian Cirloganescu ein av sínum góðu døgum, so er hampuliga trupulthjámótstøðuliðunum at gera nakað sum helst.

Higar til hevur hetta verið nóg mikið til at staðfesta oddasessin í Atlantic Airways-kappingini. Men spurningurin í løtuni er helst, um hetta eisini er nóg mikið til steypasigur. Fram um øll hini, so hava strandingar við átta finalum á rað – harav sjey sigrum – undirstrikað, at teir duga kynstrið at lyfta seg til tær heilt stóru uppgávurnar.

Føroyskur manshondbóltur hevur ikki upplivað eina greipu síðani 1998, men strandingar tykjast í løtuni at vera somikið glóðheitir, at tað ikki er heilt av vegnum, um teir fara avstað við eini slíkari hetta kappingarárið.

### FAKTA

**StÍF-H71 30-22 (12-9)**
10 min: 6-2
20 min: 10-4
40 min: 16-13
50 min: 23-16
**Málskjúttar**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 7(1), Danni Syhler 6, David Edvardsen 6, Leivur Justinussen 4, Borgar Danielsen 3, André F. Danielsen 3
**H71:** Dánjal Tórgarð 8(1), Halgir Dahl Olesen 6(1), Christian Eli Zachariassen 3, Gunnar Bláberg 2, Freddy Poulsen 2, Poul Kjartan Dam 1
**Brotskøst:** StÍF 1, H71 4
**Útvísingar:** StÍF 2, H71 1
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg